# FERÐAVINNA Í FØROYUM

## EIN ÁBYRGDAFULL OG BURÐARDYGG LEIÐ



UTTANRÍKIS- OG
VINNUMÁLARÁÐIÐ



Samandráttur av áliti handað Poul Michelsen, landstýrissmanni í uttanríkis- og vinnumálum, 5. mai 2017. Alt álitið er at finna á www.uvmr.fo

Við støði í orðingunum um ferðavinnu í samgonguskjalinum setti landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum í januar 2016 ein arbeiðsbólk at orða eina virkisætlan fyri ferðavinnuna, sum skal vera grundarlag undir einari tilgongd at menna ferðavinnuna í Føroyum.

**Arbeiðssetningur:**

- Orða eina virkisætlan fyri innlendis menning av ferðavinnuni og at lýsa fylgjandi tættir:
- Eyðmerkja avbjóðingar, avmarkingar ella forðingar innan føroyska ferðavinnu í dag.
- Orða ítøkilig tilmæli til átøk ella broytingar, sum kunnu slóða fyri menning innan innanoyggja ferðavinnu.
- Út frá hesum gera eina heildarætlan við ítøkiligum átøkum at seta í verk.

**Arbeiðsbólkur:**

Jóhan Pauli Helgason og Gunvør Balle frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum (skrivaratoymið)
Hanna á Reynatúgvu fyri Kunningarstovurnar
Eyðun Christiansen fyri Kommunufelagið
Maria Gunnleivsdóttir Hansen fyri Umhvørvisstovuna
Henny á Líknagøtu fyri Ferðavinnufelagið

Uttanríkis- og Vinnumálaráði
Uppseting: Barbara
Prent: Føroyarprent
Myndir: Visit Faroe Islands, William Anderson, Barbara BIskopstø, Ólavur Frederiksen, Kimberley Coole, Maxwell Rouche, Andrea Ricordi, Martin Paldan, Gabriel Nivera, Bárður F. Mikladal, Alex Valeur og Jacob Eskildsen



## HØVUÐSNIÐURSTØÐUR:

- Ein menningardeild eigur at verða skipað á Visit Faroe Islands við serskildari játtan og samleika. Í samstarvi við kommunur, kunningarstovur og vinnu skal deildin samskipa og stuðla undir, at ferðavinnutilboð verða ment kring landið.

- Náttúran er ov lítið vard, og tað hevur alstóran týdning at gera neyðugt lógarverk og seta orku av til náttúruvernd og fyrisiting.

- Grundleggjandi er, at yvirskipaðu karmarnir eru væl skipaðir, og at vit arbeiða eftir meginreglunum um burðardygga ferðavinnu:
  - Náttúra og umhvørvi: Ferðavinnan skal skipast soleiðis, at umhvørvið ikki verður dálkað, og náttúran verður varðveitt.
  - Sosialt: Ferðavinnan ger seg ikki inn á bygdarlív og sosialar skipanir.
  - Búskapur: Ferðavinnan heldur á at kasta av sær og geva lokala umhvørvinum búskaparligan ágóða.

- Fyritreytin fyri at náa málinum um eina burðardygga ferðavinnu er, at allir partar av vinnuni, almennir myndugleikar, stovnar og kommunur kenna týdningin av hugtakinum "burðardygd," og at øll arbeiða fram í móti hesum sama máli.

- Neyðugt er at fáa greiðar reglur og mannagongdir fyri gongd í haga, m.a. spurningin um at taka gjøld.

- Landið – gjøgnum menningardeildina í Visit Faroe Islands - hevur yvirskipaða ábyrgd av at samskipa og stuðla undir menning av ferðavinnuni kring landið.

- Kommunurnar hava høvuðsábyrgd av at menna og skipa ferðavinnuna í teirra øki, m.a. kunningarstovuvirksemi.

- Mentanartilboð - fornminni, søvn o.a. - og kunning til ferðafólk skulu fáa hægri raðfesting.

- Dygdargóðar útbúgvingar, skeið og gransking eru grundleggjandi fyritreytir fyri, at førleikarnir styrkjast og fleiri vitanartung størv verða skapt í vinnuni.

- Átøk eiga at verða gjørd fyri at styrkja inntøkumøguleikarnar hjá vinnu, kommunum og landi.

- Tað er umráðandi, at ein tvørgangandi stýrisbólkur við landsstýrisfólkum úr viðkomandi aðalráðum verður settur í eitt 5-ára skeið at samskipa og útinna átøkini, ið kunnu skapa eina burðardygga ferðavinnu.

## FERÐAVINNAN Í DAG

Vit síggja tey nærum hvønn dag. Tey seta dám á og ávirka okkara gerandisdag og náttúruna, vit liva í. Ferðavinnan er komin til Føroya fyri at vera. Bæði tí vit alsamt ferðast meira í egnum landi, og tí fólk úr øllum heiminum ferðast higar at síggja og uppliva okkara land. Tí skulu vit vera errin av. Men vit mugu duga betur at taka ímóti teimum mongu, sum koma at vitja okkum. Vit mugu hava betri karmar kring ferðavinnuvirksemið, og vit mugu duga betur at skipa og samskipa tilboð, kunning og verkætlanir.

Seinastu árini hevur talið av ferðafólkum í Føroyum ferð eftir ferð sett met – frá 2013 til 2016 vaks talið á gistingum úr 132 tús. upp í 160 tús. Framgongdin sæst aftur í búskapinum, har umsetningurin frá útlendskum ferðafólkum nú táttar í 700 milliónir ella sløk 10 prosent av samlaða útflutningsvirðinum.

> Ferðavinnan fyllir sostatt alsamt meiri í føroysku náttúruni, í føroyska búskapinum og í samfelagnum Føroyum sum heild, og alt bendir á, at gongdin fer at halda fram.

Føroyar eru vorðnar eitt forvitnisligt land at vitja. Ferðamálið Føroyar er javnan at síggja í viðurkendum altjóða miðlum. Tilboðini til ferðafólk eru fleiri og fjølbroyttari enn nakrantíð, gistingarmøguleikarnir eru mentir nógv og kapping er á flogrutuni til Føroya. Grundarlagið fyri enn størri vøkstri er til staðar, og tí er rætta løtan at leggja lunnar undir ein politikk, sum samskipar ferðavinnuna í Føroyum á burðardyggum grundarlagi.

> Vit viðurkenna, at tað er ein drúgv og áhaldandi tilgongd at menna ferðavinnuna. Fremsta endamálið við hesi ferðavinnuætlan er at byrja eina stigvísa tilgongd, sum kann hava við sær, at vit sum frá líður røkka málinum um eina burðardygga ferðavinnu.




4


P/F POUL HANSE
MAERSK AIR
SAS
ATLANTIC AIRWAYS

## BURÐARDYGG FERÐAVINNA

Burðardyggur vøkstur er varandi vøkstur. Og varandi vøkstur er kappingarførur vøkstur.

Ein burðardygg ferðavinna hevur tríggjar høvuðstættir. Hon tekur atlit at náttúruni, hon er kjølfest í, at búskapinum, hon er partur av, og samfelagnum, hon virkar í. Náttúra og umhvørvi eiga ikki at bøta fyri tey mongu vitjandi. Hinvegin eigur ferðavinnan at stimbra undir gransking, varðveitslu og verndarátøk.

Ferðavinnan má vera burðardygg fyri at verða varandi. Oyðileggjandi árin máa støði undan ferðavinnuni.

Virðisøking í ferðavinnuni eigur at vera lokal. Hon eigur at halda fram at kasta av sær og vera ein búskaparlig súla undir menning í nærumhvørvinum.

Ferðavinnan ger seg ikki inn á mentan og bygdarlív, men eigur heldur at styrkja føroyskan samleika og skapa nýtt mentanarlív í nærumhvørvinum.

Vit stremba tí eftir eini ferðavinnu, sum tryggjar, at náttúran ikki bøtir fyri tey mongu vitjandi, at ferðafólkið fær eina minniliga vitjan, og at Føroyar fáa eitt avkast.








Tað er neyðugt at menna og endurnýggja ferðavinnuna, so hon er fíggjarliga lívfør, uttan at náttúran tekur skaða. Komandi ættarlið skulu hava somu náttúru-, samfelags- og búskaparfortreytir, sum vit hava í dag.

## NÁTTÚRA OG VERND

Náttúran er fortreytin fyri ferðavinnu í Føroyum. Fólk ferðast til Føroya og í Føroyum fyrst og fremst fyri at síggja og uppliva náttúruna. Náttúran er tí at meta sum tilfeingi, ið er grundarlag undir allari vinnuni. Verður hetta tilfeingi ikki gagnnýtt burðardygt, er vinnuni ikki lív lagað.

Oyðileggjandi árin á náttúruna máa støðið undan vinnuni, og Føroyar kunnu missa sítt virði sum ferðamál. Føroyar hava onga náttúruverndarlóg og onga náttúrufyrisiting. Hesum er stórur tørvur á fyri at gera munagóð átøk á náttúruverndar- og friðingarøkinum.

Tí er tað avgerandi, at lóggáva um náttúruvernd verður sett í gildi, og at ein munagóð fyrisiting verður skipað, sum skal umsita og handhevja lógina. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur sett sjøtul á hetta arbeiðið, sum eftir ætlan skal leggjast fyri Løgtingið í 2017.

**Millum annað tørvar okkum reglur, sum**

- avmarka ferðing í náttúruni, har hon er viðbrekin
  - sigling fram við landi og undir bjørgum
  - koyring í haga
- forða fyri spjaðing av fremmandum plantum og dýrum
- forða fyri at rottur spjaða seg í rottufríum oyggjum
- banna at plantur og dýr verða tikin úr náttúruni

Tað er eisini neyðugt við greiðum ásetingum um revsing fyri brot á náttúruverndarlógina.

**Náttúrufyrisitingin skal millum annað**

- kortleggja og kanna føroysku náttúruna
- gera fuglateljingar og aðrar stovnsmetingar
- eyðmerkja og verja viðkvom støð í náttúruni
- seta krøv um árinsmetingar og meta um burðarorku

Loyvi eigur at verða kravt at koyra við motorakførum í náttúruni, og tey, sum sigla við fólki kring oyggjarnar, eiga at verða góðkend. Ferðaleiðarar eiga at hava viðkomandi skeið um ferðing í náttúru.



Mælt verður til at banna ferðamannaskipum at kasta akker millum oyggjarnar og brúka egnar smábátar til útferðir. Hetta er neyðugt fyri at steðga óskipaðari og møguliga vandamiklari ferðslu á sjógvi og landi, sum ikki er myndugleikagóðkend, og sum kann vera kappingaravlagandi fyri ferðavinnuna.

## MYKINES

Mykines er millum væl vitjaðu ferðamálini í Føroyum. Mongu ferðafólkini leggja nógv trýst á náttúruna og fuglalívið í oynni - serliga á leiðini út í Hólmin og gjøgnum viðbrekna lundalandið í Lamba. Vitjanir út í Hólmin mugu skipast betur. Einans góðkendir ferðaleiðarar eiga at fara hagar við fólki. Tíðaravmarkingar og hægstamark av ferðafólki um dagin eiga at viðgerast.

Kanningar eiga at verða settar í verk, í fyrstu syftu av lundalandinum í Lamba, sum kunnu staðfesta, hvussu lundin verður órógvaður sum minst. Við støði í hesum kanningum eiga at verða gjørd tilmæli sum áseta, hvussu ferðslan út í Hólmin kann skipast. Er grundarlag fyri at seta friðingar í verk fyri økið, eiga hesi tilmæli síðani at vera støði undir friðingarúrskurði ella kunngerð, sum ásetir, hvussu gongdin út í Hólmin skal skipast.

Mongu ferðafólkini í Mykinesi skapa at kalla ongar inntøkur fyri oynna sjálva. Av tí sama er ikki orka til at menna oynna sum ferðamál. Tí endurspeglar Mykines tørvin at skipa ferðavinnuna í Føroyum burðardygt. Atlit mugu takast at náttúruni, virði mugu skapast á staðnum, og menningin má fara fram í samráð við bygdarsamfelagið.



## GONGD Í HAGA

Í fleiri av okkara grannalondum er sonevndi almannarætturin galdandi. Í summum londum, t.d. Noregi og Íslandi, er rætturin skipaður í lóg, meðan tað aðrastaðni, t.d. í Svøríki, verður víst til hevdvunnan sið.

Almannarættur hevur við sær, at almenningurin hevur rættindi at ferðast og uppihalda sær í náttúruni. Talan er um rættindi, sum ganga framum privata ognarrættin, tó at privatar ognir ikki mugu líða tap ella óneyðugt órógv orsakað av almannarættinum.

Í Føroyum er eingin lógarfestur almannarættur, og lógarkøn eru ikki samd um, hvørt rætturin at ganga í haga í Føroyum er vorðin ein hevdvunnin siður ella ikki.

Lógarverkið á økinum er ótíðarhóskandi og viðger bara siðbundnan landbúnað. Lóggávan leggur ikki upp fyri ferðavinnuni og náttúruni sum eitt rúm hjá fólki at uppliva, at taka sær av løttum í ella fara útferðir í. Tí er tað ein avbjóðing at brúka galdandi lóggávu sum støði undir eini betur skipaðari ferðavinnu.

Tørvur er á lóggávu, sum nærri løgskipar rættin at ferðast í náttúruni. Lóggávan skal vera í samsvari við meginreglurnar um almannarætt, samstundis sum lagt verður upp fyri rætti jarðareigarans at reka landbúnað.

Sum grundarlag undir slíkari lóggávu eigur kanningararbeiði fyrst at verða gjørt, sum útgreinar omanfyrinevndu viðurskifti nærri. Ein arbeiðsbólkur undir leiðslu av HIMR skal orða tilmæli til landsstýrið um, hvussu ein nýggj lóg um frítíðarvirksemi kann verða skipað. Í sambandi við hetta kanningararbeiði eiga bøndur, kommunur, ferðavinnan og landsmyndugleikar at vera tikin við upp á ráð.



## MENNINGARDEILD

Fyri at kjølfesta eina burðardygga ferðavinnu verður ein nýggj deild skipað undir Visit Faroe Islands. Menningardeildin fær egið navn og samleika og eina tilskilaða játtan at seta minst tvey starvsfólk at standa fyri ferðavinnumenning í Føroyum.

Virkni leikluturin hjá Visit Faroe Islands at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál hevur eydnast væl. Stovnurin hevur vitan, førleikar umframt almenna og politiska vælvild. Menningardeildin byrjar tí ikki á berum, men hevur eina roynda fyrisiting og eitt fakligt umhvørvi at festa røtur í.

Við at leggja deildina, sum hevur ábyrgd av at menna ferðavinnuna í Føroyum, undir Visit Faroe Islands, verður tí bygt á tað, sum í verki hevur víst seg at bera til og geva úrslit. At Visit Faroe Islands fær eina nýggja deild og økt virkisøki, eigur kortini ikki at skerja virksemið at marknaðarføra Føroyar uttanlands, tí ferðafólk eru fortreytin fyri innanlandsmenning. Marknaðarføring og menning skulu tí ganga hond í hond og skapa fortreytir hvør fyri øðrum.

Endamálið hjá Visit Faroe Islands er at savna, samskipa og selja Føroyar sum ferðamál.

Í fyrsta umfari verður mett, at tvey fólk skulu starvast á nýggju deildini, sum skal vera toghaldari fyri allari ferðavinnumenning í Føroyum.

Nýggja deildin krevur lógarbroyting, til tess at endamálsorðingin eisini fevnir um virksemið hjá nýggju deildini. Mælt verður til, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer undir fyrireikandi arbeiðið beinanvegin.



# MENNING KRING LANDIÐ

Menningardeildin skal hava sum høvuðsendamál at skipa og samskipa ferðavinnuna í Føroyum. Ein týðandi táttur er tí at eggja til menning um alt landið við miðvísum, fjølbroyttum átøkum. Menningardeildin sjálv skal ikki skapa ferðavinnutilboð, men við eini stuðulsjáttan skal hon stimbra og ráðgeva fyritøkum, kommunum og íverksetarum.

Tí at skipa ferðavinnuna í Føroyum kostar, men talan er um útreiðslur, sum skulu síggjast sum íløgur, ið leggja lunnar undir eina vinnu í menning í Føroyum. Og játtanin tryggjar, at bæði ferðafólk og føroyska samfelagið fáa sum mest gagn burturúr ferðavinnuni.

7 milliónir krónur eiga at verða játtaðar til menningardeildina. Tvær mió. kr. koma frá verandi økisstuðli og krónu-fyri-krónu-leistinum, og hinar 5 mió. kr. eru nýggj játtan. Rakstur og starvsfólk kosta eina góða mió. kr., og hinar sløku 6 mió. kr. eiga at fara til menningarátøk kring landið.






2,75 milliónir verða latnar í stuðli til verkætlanir, sum menningardeildin beinleiðis varðar av og stýrir í samstarvi við kommunur og vinnu. Talan kann verða um verkætlanarsett starvsfólk kring landið, sum ráðgeva ferðavinnuni, samskipa kunning og skipa ætlanir um ferðavinnuvirksemi í økjum kring landið.

2,75 milliónir verða latnar í stuðli eftir krónu-fyri-krónu-leistinum til vinnuligar ferðavinnuverkætlanir í kommununum. Talan kann vera um nýggj upplivingartilboð, veitingar ella tænastur til ferðafólk. Stuðulin er kortini treytaður av, at vinnan sjálv ella avvarðandi kommuna fíggja minst helvtina av kostnaðinum.

Við menningardeildini á Visit Faroe Islands verður greiðari samband millum marknaðarføring uttanlands og menning innanlands.

Deildin er snúningsásur fyri menningini av ferðavinnuni í Føroyum. Fjøltáttaða virkisøkið hjá deildini fer umframt at umsita stuðulsskipanina og samskipa økisætlanir, eisini at fevna um samstarv við aðrar stovnar og myndugleikar.

- Samskifta við Strandfaraskip Landsins um broyttan flutningstørv og kostnaðarbygnað fyri ferðaseðlar.
- Í samstarvi við Mentamálaráðið seta sjøtul á arbeiðið at útbyggja og menna ferðavinnuútbúgvingar, skeið, granskingarverkætlanir o.s.fr.
- Í samstarvi við náttúru- og umhvørvismyndugleikar at tryggja, at ferðavinnan ikki elvir til skaða á náttúru ella umhvørvi.
- Í samráð við m.a. Hagstovuna og Vága Floghavn er neyðugt at útbyggja hagtalsgrundarlagið.
- Í samráð og samstarvi við m.a. tilbúgvingarmyndugleikar at tryggja røttu kunningina til ferðandi í mun til m.a. gongd í haga og at tryggja, at tilbúgvingin er virkisfør í mun til eina vaksandi ferðavinnu.
- Kanna um tørvur er á einari góðkenningar- ella løggildingarskipan av ferðavinnutilboðum.

Við menningardeildini fær ferðavinnan umleið 6 milliónir at luta út sum stuðul til átøk um alt landið. Í dag er upphæddin 1,5 millión kr.



# ÚTBÚGVING

Førleikar eru neyðugir fyri at geva ferðafólki eina so góða heildarfatan av Føroyum sum til ber. Førleikar innan ferðavinnuna – bæði í mun til tænastu og ferðaleiðaravirksemi – tryggja eisini burðardyggu høvuðssúluna í vinnuni.

Ferðaleiðarar og øll, sum veita ferðafólki tænastur undir ferð teirra, eru at rokna sum umboð fyri ferðamálið Føroyar. Øll, sum starvast við ferðafólki, eiga tí at vera fakliga ílatin at taka ímóti teimum.

## Ein skipað útbúgvingartilgongd til ferðavinnuna eigur at verða fleirbýtt:

### Í samstarvi millum Yrkisráðið, miðnámsskúlar og vinnuna eigur ein ferðaleiðaraútbúgving at setast á stovn

- Ferðaleiðaraútbúgvingin eigur at lúka altjóða krøv
- At vera ferðaleiðari eigur at krevja fjøltáttað innlit í føroysk viðurskifti og náttúru.
  - T.d. søgu, samfelag, politikk, náttúru, orku, jarðfrøði og lívfrøði.
  - Fyrstahjálp eigur at verða partur av ferðaleiðararútbúgvingini.

### Hægri útbúgving og gransking

- Ferðavinnan eigur at fáa rúm sum vísindaligt fakøki til tess at framleiða vitan um vinnuna.
  - Tað fevnir um eina røð av tættum, t.d. mentan, mat, náttúru, burðardygd og árin.
  - Vitan um, hvussu føroyingar fata ferðafólk, og hvussu ferðafólk fata føroyingar, er eisini virðismikil.
  - Tørvur er eisini á eini greiðari mynd av, hvør ferðast til Føroya.
  - Setrið eigur at bjóða útbúgvingar og skeið, ið gagna ferðavinnuni.

### Tænastuútbúgvingar

- Ferðavinnulærugreinar eiga at verða fyrireikaðar og bodnar út á miðnámi.
- Skrivstovuútbúgvingarnar við sergrein í ferðavinnu eiga eisini at leggja dent á at selja Føroyar sum ferðamál, ikki bara at selja føroyingum ferðir út í heim.
- Ferðavinnan eigur at vera partur av undirvísing um íverksetan.
- Tørvur er á grundleggjandi tænastuskeiði fyri øll, sum í sínum yrki fáast við ferðafólk.
  - Hýruvognsførarar, bussførarar, tænarar, móttøkufólk og veitarar.
- Matmentanin í Føroyum stendur fyri vøkstri, og tað almenna eigur at spæla við í menningini.
  - Størri vitan um rávørur, stuðul til matroyndir og gransking á økinum eru neyðugar.

### Myndugleikagóðkenning/ løggilding

- Støða eigur at vera tikin til, hvørji tilboð skulu góðkennast.
- Løggilt virksemi borgar fyri trygd og virkar sum eitt dygdarstempul hjá ferðasmiðum.



Ein bólkur er farin til verka at snikka saman eina ferðavinnuútbúgving á Miðnámi í Vestmanna eftir at skúlin fekk játtan til tess á fíggjarlógini í 2017.

## LIVANDI MENTAN

Náttúran dregur í stóran mun fólk til Føroya og kring Føroyar. Men ferðafólk vísa eisini stóran áhuga fyri okkara mentanararvi. Mentanararvurin avspeglar okkara samleika og søgu sum fólk og land. Tí mugu bygdasøvn, listasøvn, útgrevstrar og vitjanarverd støð annars samskipast betur og raðfestast hægri.

Fornminnissavnið eigur at sýna fram í miðbýnum í Havn

- Av teimum 45.000 fólkunum, sum vitja Kunningarstovuna í Havn, eru bara heilt fá, sum eisini vitja framsýningina hjá Fornminnissavninum í Hoyvík.
- Søvnum Landsins tørvar orku til eina marknaðardeild.

Ein leistur kundi verið at ein oyggj ella eitt øki hevði
eitt fakfólk í starvi at umsita lokalu søvnini.

Tey umleið 20 lista- og bygdasøvnini kring landið liva av vælvild frá eldsálum og leikfólki. Tískil eru upplatingartíðir sjáldan fastlagdar.

- Søvnini kring landið eiga framvegis at verða lokalt kjølfest og rikin. Men fyri at styrkja og gera tey professionell, eiga tey at verða samskipað og hava fakfólk í starvi.
- Mentamálaráðið, Søvn Landsins, kommunurnar og menningardeildin hjá Visit Faroe Islands eiga at vegleiða søvnunum í hesum arbeiði.
- Ein leistur kundi verið, at ein oyggj ella eitt øki hevði eitt fakfólk í starvi til tess at umsita lokalu søvnini.
- Størri savnsdeplar við fakfólki í starvi hava víst seg at geva góð úrslit í Hetlandi og Íslandi.



Arbeitt eigur at verða miðvíst fram ímóti at fáa Føroyar á heimsarvlistan hjá UNESCO.

Kirkjubøur er millum væl vitjaðu søguligu støðini í Føroyum – har eiga kommuna og savnsmyndugleikar at bøta um umstøðurnar hjá teimum vitjandi, upplýsa betur og tryggja bakkaverjuna.

Koltur hevur serstøðu sum savnsoyggj og eigur at verða skipað sum ferðamál.

Hvalastøðin við Áir eigur at gerast liðug og nýtast sum livandi savn.

## HAGTØL OG VITAN

Hagtalsgrundarlagið at viðgera ferðavinnuna í dag er ikki nøktandi. Vit vita ikki neyvt, hvussu nógv útlendsk ferðafólk ferðast til Føroya og í Føroyum. Álítandi hagtøl eru avgerandi fyri, at vinnan kann mennast, og at politiskar avgerðir verða tiknar á røttum grundarlagi.

Øll, ið ferðast sjóvegis til Føroya, verða skrásett eftir tjóðskapi, men hetta verður ikki gjørt í sambandi við loftvegis ferðsluna.

Vága Floghavn eigur beinanvegin at seta í verk eina skrásetingarskipan til ferðafólk. Vága Floghavn eigur, sum ein almenn fyritøka, at rinda fyri skipanina.

Ferðavinnan er ein týðandi vinnugrein. Umsetningurin er mettur at vera knappar 700 milliónir. Men júst hvussu nógv ferðafólk leggja eftir seg, ella hvørjar inntøkur ferðavinnan skapar í Føroyum, ber ikki til at siga við verandi vitan og hagtølum.

Hýsingarskipanin Airbnb hevur tikið dik á seg í Føroyum seinnu árini. Mett verður, at tað eru umleið 300 Airbnb bústaðir skrásettir í Føroyum – tað svarar til í minsta lagi 900 seingjarpláss um samdøgrið – ella fýra ferðir so nógv sum størsta gistingarhús í landinum.



Mælt verður tí til regluligar frágreiðingar um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni.

Til tess at tryggja skattainntøkur frá Airbnb útleigu, og fyri at økja um vitanina um gistingarmøguleikar í ferðavinnuni, eiga allar Airbnb vitjanir at verða skrásettar.

## INNTØKUMØGULEIKAR

Ein vaksandi ferðavinna leggur størri skyldur, ábyrgd og útreiðslur á almennu Føroyar. Hetta er serliga galdandi fyri náttúruvernd, samferðslukervið og øktari tilbúgving, men eisini onnur øki.

Útreiðslurnar til ferðavinnu verða aðrastaðni fíggjaðar við ymiskum avgjøldum á ferðafólk og vinnu. Júst hvussu tey verða skipað, er ein politiskur spurningur, men fleiri møguleikar eru:

**Lógarbroytingar um ferðaavgjald:**
- Seta inntøkurnar frá ferðaavgjaldi á serkontu til umsiting av ferðavinnuni.
- Hækka ferðaavgjaldið og seta tað á serkontu til umsiting av ferðavinnuni.
- Áseta ymisk ferðaavgjøld fyri føroyingar og útlendsk ferðafólk.
- Krevja ferðaavgjald frá fólki við ferðamannaskipum.

## AÐRIR MØGULEIKAR

- Eisini ber til at seta avgjald á gisting, inntøkur frá leigubilum ella krevja ein beinleiðis ferðaskatt, sum útlendskt ferðafólk rinda áðrenn fráferð úr Føroyum.
- Gjald fyri at ferðast í náttúruni, til dømis eitt ferðapass.
- Gjøld eiga kortini ikki at gera prísstøðið í ferðavinnuni minni kappingarført við grannalondini.





Umframt avgjøld, ber eisini til at seta í verk átøk, sum bøta um kappingarførið hjá vinnuni og harvið skapa landinum størri óbeinleiðis inntøkur.

- Lógin um innflutning og sølu av rúsdrekka eigur at verða broytt, so matstovur sjálvar kunnu flyta inn øl, vín og sterkari løgir. Rúsdrekkasøla Landsins missir harvið einarættin til innflutning, men eigur kortini at fáa loyvi at selja vinnuni rúsdrekka bíligari enn borgarin fær í leysasølu.
- Meirvirðisgjaldið eigur at verða lækkað fyri matstovu-vinnuna. Matur og drekka eru dýrari at keypa inn í Føroyum enn aðrastaðni, og tí er tungt at fáa raksturin at bera til hjá nógvum matstovum. Í grannalondunum rinda matstovur millum 11 og 13 prosent í meirvirðisgjaldi.

## STRANDFERÐSLAN

Strandferðslan er ein lyklaleikari at veita ferðavinnuni góða og smidliga tænastu. Strandferðslan hevur flutningsskyldu, men farleiðirnar verða í stóran mun fíggjaðar av føroyska skattgjaldaranum afturfyri bíligar ferðaseðlar. Tað sama er galdandi fyri rutuflúgvingina hjá tyrlutænastuni.

Sum útgangsstøði er eingin orsøk at lata øðrum enn teimum borgarum, sum rinda skatt fyri alment fíggjaðu farleiðirnar, lut í bíligum ferðaseðlunum. Í Føroyum er loyvt at gera mun á fólki vegna tjóðskap ella endamál við ferðum, hóast ES-lóggáva ikki loyvir hesum. Men at áseta ymisk gjøld er ein avbjóðing at umsita og hevði ikki givið eina innbjóðandi fatan av Føroyum sum vertslandi.

Strandferðslan eigur sum skjótast at seta í verk eina bókingarskipan á netinum. Ein fortreyt fyri ferðing er, at til ber at leggja til rættis alla ferðina áðrenn. Men hetta ber ikki til, skalt tú t.d. úr París til Suðuroyar. Hetta er ein skipan, sum ferðavinnan leingi hevur eftirlýst. Hon kann menna ferðavinnuna um alt landið og økja um inntøkumøguleikarnar hjá Strandferðsluni.

Samstundis eigur Strandferðslan saman við avvarðandi pørtum at eftirmeta ferðaætlanirnar, og leggja tær til rættis við størri atliti at ferðavinnuni

Fyrsta upplivingin í einum landi hevur nógv at siga fyri restina av ferðini. Tað elvir ofta til ørkymlan, at bussar bara koyra av flogvøllinum í sambandi við úrvaldar flogferðir. Hetta eigur at verða broytt sum skjótast.

---

Ferðavinnan hevur tørv á reglusemi. Tilkallingarskipanir eru ein bági fyri ferðavinnuna. Reglusemi alt árið og fleiri túrar til úrvald ferðavinnupláss eiga at verða umhugsað. Ein bókingarskipan hevði skúgvað nógv ivamál um innanlands ferðing til viks.




RITAN
TÓRSHAVN

## ÁBYRGDARBÝTI OG SAMSKIPAN

Ferðavinnan fevnir vítt og er spjødd millum fleiri myndugleikar, stovnar og vinnugreinar, umframt at hon røkkur í hvønn krók í landinum.

Nú farið verður undir at nútímansgera og skipa ferðavinnuna er umráðandi, at ábyrgdarbýtið millum avvarðandi partar er greitt tilskilað.

Landið skal skapa karmarnar fyri eina vælvirkandi vinnu og tryggja, at vøksturin er burðardyggur. Landið hevur ábyrgd av stuðulsskipanum til vinnuna, og landið kann áseta gjøld, avmarkingar og bøtur og krevja góðkenningar til tess at stýra ferðavinnuvirkseminum.

**Ábyrgdin av lógarverkinum er fjøltáttað og fevnir um flest øll stjórnarráð**

**Uttanríkis og vinnumálaráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av lógarverkinum, sum er knýtt at ferðavinnuni, millum annað:**
- Visit Faroe Islands
- Trygdarátøk og reglugerðir á sjónum
- Inn- og útflutning av matvørum
- Broyting í rúsdrekkalógini

**Heilsu- og innlendismálaráðið varðar av:**
- Náttúru- og umhvørvisvernd
- Náttúrufriðing
- Lendisætlanum

**Fiskimálaráðið varðar av:**
- Tilbúgving
- Gongd í haga og nýtsla av lendi

**Mentamálaráðið varðar av:**
- Ferðavinnuútbúgvingum og røttum førleikum innan savns- og mentanarøkið
- Søvnum og mentanartilboðum

**Samferðslumálaráðið varðar av:**
- Strandferðsluni
- Vága Floghavn

**Fíggjarmálaráðið varðar av:**
- Avgjøldum
- Meirvirðisgjaldi

Spjadda ábyrgdarbýtið krevur neyva samskipan og toghaldan. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur evstu ábyrgd at tryggja framgongd í arbeiðinum at skipa ferðavinnuna, og at arbeiðið millum stjórnarráðini er væl samskipað.



Ein stýrisbólkur undir leiðslu av Uttanríkis- og vinnumálaráðnum verður settur at samskipa ferðavinnuna. Landsstýrisfólkini í avvarðandi stjórnarráðum manna bólkin. Hann skal saman við Visit Faroe Islands syrgja fyri, at tilmælini verða útint í verki og regluliga eftirmeta, hvussu tey virka og rætta inn, so hvørt tørvur er á tillagingum.




Kommunurnar skapa neyðugu karmarnar og fortreytirnar fyri ferðavinnumenningini, so tað verður lagaligari hjá borgarum á staðnum og lokalari vinnu at taka stig til nýggj átøk og tilboð innan ferðavinnuna.

Landið setir karmarnar og lóggávuna og kann veita ráðgeving og stuðulsskipanirnar, sum gera tað lagaligt at skipa nýggj tilboð. Men tað eru kommunurnar saman við kunningarstovum, lokala vinnulívinum og eldsálum í økinum, sum mugu fáa til vega neyðuga undirstøðukervið og gera neyðuga praktiska arbeiðið, fyri at ferðavinnan skal virka - sjálvsagt við vegleiðing og ráðgeving frá Visit Faroe Islands.

Eins og við øllum øðrum raðfestingum eru tað soleiðis eisini kommunurnar, sum mugu gera av, um tær vilja raðfesta eina kunningarstovu í kommununi, um tær vilja taka seg saman í kommunal samstørv innan ferðavinnuna, og hvussu ferðavinnan sum heild skal skipast og fíggjast lokalt.



Tað er týðandi at staðfesta, at kommunurnar saman við møguligum kunningarstovum, lokala vinnulívinum og eldsálum í økinum, skapa lokalu ferðavinnumenningina. Stuðulsskipanir og stovnar, sum landið varðar av, kunnu stuðla kommununum í at menna ferðavinnuna, meðan kommunan er drívmegin.



**UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ**

Grundarlagið undir tilmælunum eru yvir 60 fundir við fleiri enn 100 fólk, ið á ymsan hátt eru knýtt at ferðavinnuni, umfremt ein røð av ráðstevnum og framløgum.

FEBRUAR 2016:
- Visit Faroe Islands, Guðrið Højgaard og Johannes Jensen
- Niclas Heri Jákupsson
- 62N, Hildur Djurhuus
- Visit Tórshavn, Theresa T. Kreutzmann

*Norðoyggjar:*
- Norðoya Kunningarstova, Elsa Olsen
- Norðlýsið, Olivur Joensen o.o. frá Visit Kalsoy
- Klaksvíkar kommuna, Jógvan Skorðheim, borgarstjóri, og Palli Ziskasen, mentanarleiðari
- Luttøka á aðalfundinum hjá Ferðavinnufelagnum, har arbeiðsbólkurin leggur fram um arbeiðið við heildarætlanini
- Strandfaraskip Landsins, Hilmar Eliasen, stjóri

MARS 2016:
*Í Vágum:*
- Visit Vágar, Sølvi Símunarson
- Jósup, Maja Henriksen
- Atlantic Airways, Jóhanna á Bergi, stjóri, og Árni Olsen, marknaðarstjóri
- Vága Floghavn, Jákup Sverri Kass, stjóri
- Tróndur Niclasen, bóndi í Bø
- Olivia Døgg Fríðfinnsdóttir, bach. í antropologi, skrivar høvuðsuppgávu í upplivingarbúskapi/ferðavinnu

*í Havn:*
- Útoyggjafelagið, Olga Biskopstø
- FNÚ, Elisabeth S. Olsen
- Tórshavnar Havn, Annfinn Hjelm

*í Suðuroy:*
- Vágs kommuna, Dennis Holm, borgarstjóri
- Kunningarstovan, Heidi Kilgour
- Kunningarstovan á Tvøroyri, Poula Strøm
- Økisferðavinnufelagið, Arni Nielsen
- Tvøroyar kommuna, Kristin Michelsen, borgarstjóri
- SALT, Ólavur Rasmussen

*Í Eysturoy:*
- Sunda kommuna, Heðin Zachariassen, borgarstjóri og Noomi Rasmussen
- Runavíkar kommuna, Torbjørn Jacobsen, borgarstjóri
- Kunningarstovan í Runavík, Bárður Højgaard
- Gjáargarður, Eirik Suni Danielsen
- Luttøka á ferðavinnudegi í NLH
- Búnaðarstovan, Tróndur Leivsson, stjóri
- Greengate, Fríðun Jacobsen og Marni Hjalnafoss
- Norðurlandahusið, Sif Gunnarsdóttir, stjóri

APRÍL 2016:
- Elin Brimheim, fyrrv. stjóri á Samvit
- Norðlýsið, Birgir Enni
- Bóndafelagið, Sigert Patursson
- Kirkjubøgarður, Jóannes og Guðrið Patursson
- Ferðaleiðarafelagið, Bergur Samuelsen og Elin Hentze
- Náttúrufrøðingar: Anna Maria Fossaa, Janus Hansen, Jan Sørensen og Bergur Olsen
- Nax, Eyðun Berg, stjóri
- Rib62, Signar Signarsson.
- Arbeiðsferð í Íslandi: Fundir við m.a. Ferðamálaráðið, Umhvørvismálaráðið, Visit Reykjavík, ferðasmiðir o.o.

MAJ-JUNI:
- Arbeiðsferð í Skálavík
- Arbeiðsferð við Ramsar-nevndini í Mykinesi
- Søvn Landsins, Andras Mortensen, stjóri, og Erland Viberg
- KF, fund við borgarstjórar í Kommunufelagnum
- Framløga á arkitekturdøgum
- Heilsu- og innlendismálaráðið, Anni á Hædd
- Umboð fyri Føroya Sílaveiðifelag

JULI - OKTOBER:
- MB Tours, Magni Mouritsen
- Tor Shipping, Hentzar Steingrímsson
- Hiking.fo, Pól Skarðenni
- Fiskimálaráðið, Rógvi Reinert, aðalstjóri
- Fiskimálaráðið, Marjun Magnussen og Ulla Wang
- Fiskimálaráðið, Høgni Hoydal, landsstýrismaður
- Fuglafjarðar kunningarstova, Kristina Berg
- Fund við allar kunningarstovurnar
- Bjørn Patursson, Koltur
- Vestmanna Tourist Center, Gunnar Skúvadal
- Sørvágs kommuna, Suni Jacobsen, borgarstjóri
- Mykines, Heini Heinesen
- Hugskotið/Tórshavnar Kommuna, Jónhild Rasmussen og Súsanna Laursen
- Ymisk lesandi